# Alheimsdagurin fyri sjálvmorðsfyribyrging



"Sjálvmorðsfyribyrging viðkemur okkum øllum"

Í sambandi við Alheimsdagin fyri Sjálvmorðsfyribyrging verður skipað fyri tiltøkum í Miðlahúsinum í Vágsbotni leygardagin 10. september 2005.

**SEMINAR**
fyri fakfólk, sum í yrki sínum koma í samband við fólk, sum eru sjálvmorðshótt ella hava royndt at tikið lívið av sær, ella sum koma í samband við avvarðandi tá onkur hevur tikið lívið av sær.

**Leygardagin 10. sept. kl. 10-16.**

**Evnini eru hesi:**

- Um tiltakið og ætlanina við degnum. Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðingur leggur fyri.
- "Sjálvmorð í Føroyum". Tormóður Stórá, sálarlækni greiðir frá.
- "Afturlætna hurðin" - danskur stuttfilmur um at sita eftir tá ein av eins kæru hevur tikið lívið av sær. Filmurin er dokumentariskur og gjørdur av journalistinum Inger Anneberg, sum hevur granskað nógv í viðurskiftunum hjá teimum, ið sita eftir.
- "Soleiðis var støðan hjá okkum" - útsagnir og boðskapur frá føroyingum, sum sótu eftir tá ein av teirra kæru tók seg av døgum. Tormóður Stórá, sálarlækni leggur fyri.
- "Hvussu meta vit um sjálvmorðstekin og vandabólkar". Eyð Hansen Høyer, sálarlækni hevur granskað á hesum økinum og leggur fram.
- "Sjálvmorðsfyribyrging"- Heri Kragesten,. leiðandi sálarfrøðingur tosar um møguligar fyribyrgingarhættir og hvørjir møguleikar eru fyri ráðgeving og leiðbeining í dag.
- "Hvat kunnu vit gera ?" - vit taka saman um.
- Høvi verður til tjak og spurningar.

Tað er neyðugt at tekna seg til hetta tiltak. Avmarkað pláss. Tekning á alheimsdagur@hotmail.com. Kostnaður 350 krónur, íroknað ábit, frukt, og kaffi/te við køku.

**OPIÐ TILTAK**
fyri øllum, sum hava áhuga fyri evninum. Hvussu hjálpa avvarðandi og hvussu fyribyrgja sjálvmorð ?

**Leygardagin 10. sept. kl. 17.30 - 20.**

- Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna og heilsumálum leggur fyri.
- "Sannleikin um eitt sjálvmorð". Danskur dokumentarfilmur um at siga sannleikan og um opinleika í sambandi við sjálvmorð. Inger Anneberg journalistur hevur gjørt filmin. Hon hevur granskað nógv á økinum. Møguleiki fyri at leggja afturat tí sum filmurin dregur fram.
- "Munurin á sorg við sjúku og sjálvmorði". Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðingur leggur fyri.
- "Vandabólkar og sjálvmorðtekin" . Eyð Hansen Høyer, sálarlækni, hevur granskað á hesum økinum og greiðir frá.
- "Mytirnar eru nógvar um sjálvmorð". Hvat vita vit um mytir og veruleika í tað snýr seg um sjálvmorð ? Tormóður Stórá, sálarlækni leggur fyri
- "Fyribyrgingarskráir og møguleikar". Tikið verður saman um hvat vit vita og hvat verður rátt til fyri at byrgja fyri at fólk taka seg av døgum. Tormóður Stórá, sálarlækni.

**Ikki neyðugt við tilmelding til hetta tiltakið, men plássið er avmarkað !**

**Miðlahúsið í Vágsbotni saman við øðrum fyrireikarum**

miðlahúsið
í Vágsbotni



# Skrivstovufólk

Vit søknast eftir skrivstovufólki at byrja skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og fjølbroytt starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert útbúgvin innan skrivstovu, ella hevur royndir á økinum
- at tú ert ágrítin
- at tú bæði kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður samsvart nærri avtalu

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen, tel. 35 36 21 ella 21 81 15

**Vatnsoyra** Snikkaravirki p/f.

FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax 33 31 66



# Tvingsilssøla

Tvingsilssølan yvir skipið **»Høgifossur« OW 2348, BRT 2273, NRT 884,** ið var ásett at verða hildin á Dómaraskrivstovuni fríggjadagin tann 2. september 2005, kl. 13.00, **er útsett** og verður ístaðin hildin á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, **fríggjadagin tann 21. oktober 2005, kl. 13.00.**

Skipið er bygt í 1984 á Langsten Slip & Båtbyggeri A/S í Noregi. Skipið er skrásett í Sandavági í 1984.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/F Samvinnufelagið, 360 Sandavági, skipið.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Nielsi Winther Poulsen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20050533),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

*Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.*

**Føroya Fútarættur**
hin 29. august 2005



# Landsliðsvenjari í svimjing

Starvið sum venjari hjá svimjilandsliðnum verður við hesum lýst leyst at søkja.

Vit sóknast eftir persóni at standa fyri venjingini av landsliðnum og vænta at hesin hevur viðkomandi útbúgving og/ella skeið.

Vit miða eftir at venjarin kann byrja ikki seinni enn 1. oktober 2005.

Løn og starvstreytir annars vera ásett eftir nærri avtalu.

Hevur hetta tín áhuga, kann tú senda umsókn, saman við viðkomandi prógvum til:

**Svimjisamband Føroya**
Att.: Palli Ziskason
á Brekku 53
FO-700 Klaksvík

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 15. september 2005.





**Gongutúrur í**

# Hetlandi

**8.-12. september**

**Sumburgh Head**
**Rona's Hill**
**Mousa**

Nøkur fá pláss eftir

Ring 315788 / 227039
**Felagið Tórshavn**
**Kunningarstovan**



GEVIÐ BLÓÐ



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



Sosialurin i Sosialurin